

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 10 - 2012

# Atlantic Petroleum fýra nýggj loyvi í bretskum øki

Atlantic Petroleum boðar frá, at felagið higartil hevur fingið tillutað fýra loyvi í 27. loyvisumfari í bretskum øki. Bretska felagið Parkmead er fyristøðufelag á øllum fýra loyvunum, og ognarparturin hjá Atlantic Petroleum er millum 30 og 43%. Loyvini eru hesi - Teigur 15/16e. DEO (nú Parkmead) (fyristøðufelag) 34%, Atlantic Petroleum UK 33% og Faroe Petroleum 33% Teigur 30/12c, 30/13c & 30/18c. Parkmead (fyristøðufelag) 30,5%, Atlantic Petroleum UK 30,5%, Bridge 25% og Dyas 14% Teigur 205/12. Parkmead (fyristøðufelag) 30%, Atlantic Petroleum UK 30%, Summit 26%, Dyas 14% Teigur 205/23, 205/24, 205/25, 205/28, 205/29 & 205/30. Parkmead (fyristøðufelag) 43%, Atlantic Petroleum UK 43% og Dyas 14% Íalt 167 loyvi vórðu boðin út í 27. bretska loyvisumfari og fevna hesi um 330 teigar. Enn eru 61 teigar, ið myndugleikarnir vegna írestandi umhvørvismetingar, ikki hava tikið støðu til enn og hevur Atlantic Petroleum søkt um fimm loyvi í hesum teigunum. Atlantic Petroleum søkti um níggju loyvi í 27. Loyvisumfari í Bretlandi. Mynd - Ben Arabo stjóri á skrivstovuni í London saman við leitistjóranum Alyson Harding.